LM-045/2023

Fylgiskjal 11

Amnesty International Føroyar
amnesty@amnesty.fo
+298 235817

Ummæli
Uppskot til broyting í revsilógini (kynslig avnoyðsla og lokking)

Løgmálaráðið hevur í telduposti tann 30.08.2023 sent Amnesty International Føroyum uppskot til broyting í revislógini til ummælis. Amnesty Føroyar takkar fyri møguleikan at viðmerkja lógaruppskotið.

Kynsligur harðskapur á netinum er ein vaksandi trupulleiki. Revsirættarliga hava vit ikki megnað at fylgt við teimum møguleikum fyri kynsligum ágangi á netinum, sum talgilda menningin hevur ført við sær. Amnesty International Føroyar gleðist tí um hesi stigini, ið nú verða tikin, so lokking og kynslig avnoyðsla eisini verða fevnd av kapittul 24 í revsilógini um kynslig brotsverk.

Viðmerkingar til áseting um lokking
Amnesty Føroyar tekur undir við, at lokking skal gerast revsivert.

Við at innføra § 229 revsa vit ikki einans kynsliga ágangin, men eisini sjálva gongdina. Tað verður staðfest, at børn ikki hava skyld í gongdini, tá ið tey verða lokkað til kynsligan harðskap, og tað er eitt týdningarmikið stig fyri rættartrygdina og verjuna av børnum.

Amnesty Føroyar tekur undir við, at aldursmarkið verður 18 ár (heldur enn 15 ár), men vilja vit eisini gera vart við, at atlit eigur at vera tikið til serliga sárbærar bólkar t.d. fólk ið bera ávís brek, og at tað tí kann hugsast, at tað í summum førum ikki er hóskandi, at markið er 18 ár.

Viðmerkingar til áseting um kynslig avnoyðslu
Somuleiðis taka vit undir við at innføra § 229 um kynsliga avnoyðslu, so persónur verður revsaður fyri at avnoyða annan persón at fremja kynsligar gerðir á seg sjálva/n.

Við §229 verður hædd tikin fyri talgildu menningini, og teimum møguleikunum fyri kynsligum ágangi, sum fylgja við hesi menning. Vit taka undir við, at tað er ikki neyðugt við beinleiðis kropsligari nerting millum órættaða og skemmara fyri at talan er um kynsligan ágang. At revsa persónar fyri at avnoyða annan persón at fremja kynsligar gerðir á seg sjálva/n, er í tráð við tankarnar um kropsligan sjálvavgerðarrætt, sum liggur til grundar fyri einum samtykki.

Revsing má ikki verða einasta amboðið
Amnesty Føroyar gleðist um stigini, ið verða tikin, men vit vilja eisini vísa á, at revsing ikki kann vera

LM-045/2023

einasta amboðið. Vit heita tí á, at tað tvørtur um aðalráð verður arbeitt við eini ætlan at basa kynsligum harðskapi - bæði í fysiska og talgilda rúminum.

Eins og vit vístu á í fjør, tá ið nýggja ásetingin um neyðtøku varð viðgjørt og sett í gildi, er týdningarmikið, at neyðugur peningur verður settur av til skúling, kunning og fyribyrging. Tað má tryggjast, at øll viðkomandi starvsfólk verða skúlaði í nýggju ásetingunum og í kynsligum harðskapi á netinum sum heild.

Eisini er týdningarmikið, at børn og ung fáa neyðugu vitanina um, hvussu kynsligur harðskapur á netinum kann síggja út, hvaðar tey skulu venda sær og hvussu tey skulu bera seg at, skuldu tey verið fyri hesum. Hetta kundi verið gjørt við at tryggja, at øll børn í føroysku barna- og ungdómsskúlunum fáa góða, nøktandi og aldurshóskandi seksualupplýsing, har mørk, samtykki og kropsligur sjálvavgerðarrættur er partur av hesi upplýsingini.

Málið í lógini skal ikki stigmatisera

Vit fara at heita á, at málið í lógartekstinum og í viðmerkingunum er kynsneutralt. Hóast tað í størstan mun eru menn, sum fremja kynsligan ágang og gentur/kvinnur, sum eru fyri áganginum, so eru dreingir/menn eisini fyri ágangi. Um lógartekstir brúka málburð, sum undirbyggir kynsstereotypur, verður við lógartekstum hildið fast í stigmatiseringini, sum dreingir/menn, ið eru fyri kynsligum ágnagi, eru fyri.

§§ 218-221 áttu at verið endurskoðaðar

Nú arbeitt verður við kapittul 24 í Revsilógini, fara vit í Amnesty Føroyum at loyva okkum at koma við viðmerkingum, ið liggja uttan fyri uppskotið um broytingar í revsilógini. Í §§ 218-221 eru umstøður, sum geva revsing upp í 4 ár í fongsli, men vit halda, at hesar paragraffir eiga at verða endurskoðaðar og dagførdar, so at:

- So tær verja og taka atlit til serliga sárbærar bólkar, so at umstøðurnar, ið gera seg galdandi í §§ 218-221 eru herðandi heldur enn linnandi
- atlit verða tikin til Breksáttmálan og Istanbulsáttmálan (í grein 46 verða herðandi umstøður viðgjørdar)
- Tær verða sæddar í ljósinum av ásetingini um samtykki og tonkunum, ið liggja til grund fyri hesi áseting t.d. um kropsligan sjálvavgerðarrætt

Tað er ikki møguligt at snýta seg til samtykki

Í § 221 stendur, at um ein persónur sníkir seg til samlegu við ein persón, sum heldur, at persónurin er ein annar, verður gerningspersónurin revsaður við fongsli upp í 4 ár.

Amnesty Føroyar heldur, at slík støða er ein neyðtøka sambært § 216, og tí eigur § 221 at verða strikað og verið lagt afturat § 216. Í hugtakinum samtykki liggur, at samtykki verður givið ávísum persóni, og tí fyriliggur samtykki ikki í § 221, og talan er tí um neyðtøku.

Amnesty International Føroyar